# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ring handfaring av SSL

Tað er ikki eiti á undanstøkkingum í Tinganesi, nú flytingin av Strandferðsluni ikki fær heilt somu umrøðu, sum partur av politiska valdinum kundi hugsað sær. Ein umrøða, sum helst skuldi snúð seg um positivu effektina av miðspjaðing og økismenning.

Tann partin eru tað nú heldur ikki so nógv, sum hava gramt seg um. Okkurt hissini gleps frá miðstaðarpolitikkarum var helst væntandi, og hesi hava so eisini verið frammi.

Veruliga gølan er hinvegin politiska handfaringin av málinum. Ein handfaring, sum er greitt brot á spælireglurnar innan almenna arbeiðsmarknaðin, og sum hartil hóttir við at leggja ein týdningarmiklan stovn í skeljasor.

Men politiska royndin tykist nú vera at káva útyvir veruleikan við at flyta fokus.

Løgmaður sigur talan ikki vera um týðandi broyting í stovnsbygnaðinum, tá ein funktión verður flutt landafrøðiliga. Tað kann hann so royna at greiða teimum frá, sum skulu nýta fýra tímar í ferðing um dagin, um tey framvegis ætla at sita í starvi sínum. Eitt starv, sum flestu starvsfólkini helst trívast væl í, og sum tey hildu var við til at geva lívinum innihald.

Fíggjarmálaráðharrin heldur tað vera átaluvert, at tíðindini lóku til miðlarnar, áðrenn kunnandi fundur var við starvsfólkini. Vit halda tað vera átaluvert, at trý samdøgur skuldu ganga frá avgerð til kunning, soleiðis at miðlarnir høvdu møguleika at snodda seg framat tíðindunum, áðrenn starvsfólkini vórðu kunnað. Hetta er partur av tí at flyta fokus. Tí fokus eigur at verða sett á alla viðgerðina sum heild, eitt nú hví álitisfólkini ikki hava verið kunnað osfr. Og ikki hví tíðindini komu út ov tíðliga.

Innlendismálráðharrin heldur, at tað er uppgávan hjá einum komandi stjóra at byggja stovnin upp, um hesin nú fer í skeljasor. Neyvan verður lætt at finna skikkaðar kandidatar at søkja stjórastarv undir einum landsstýrismanni, sum sýnir somikið lítla virðing fyri tí, ið aðrir hava bygt undan honum. Vit eru ikki ímóti miðspjaðing og økismenning, men hon má gerast skipað og má botna í meira enn vanligum valagni.

**Sosialurin**

## »Á fúkandi ferð gjøgnum Elduvíkslíð…«

**JENS DALSGAARD**



Góði Jákup Mørk,
í Sosialinum nr. 44 hevur tú so ilt av, at Hoyvíkshøllin eitur so, sum hon eitur. Hjá mær er beint mótsætt. Hvørja ferð eg koyri fram við henni, hugsi eg, at her hevur onkur verið við hepnari hond.

Orðið 'vík' er serligt, tí tað hevur tveir formar í hvørsfalli eintali: 'víkar' og 'víks'. Teir vísu eru ikki samdir um, ella vita ikki, hví hetta er so. Vit onnur kunnu kortini síggja, at tað er so. Tú kann royna at spyrja eitt eldri fólk, sum ikki er skúlað í formellari mállæru um hetta, og tað ivast ongantíð. Tað skuldi sanniliga eisini talt!

Málrøkt er ikki bara at finna strangar reglur, sum málið so skal kroystast eftir, men málrøkt er eisini at lurta eftir, hvussu tað nú eitur, hvussu sagt verður. Grammatikk er bara ein fátæk roynd at beskriva eitt mál so frægt, sum tað ber til. Neyvan nakað mál - uttan kanska esperanto, sum er totalt turrgelt - hevur eingi undantøk frá (høvuðs)reglunum. Og tað er ein veruleiki, at tungumál sjálvi eru nógv eldri enn grammatikk. Hetta er ikki minst galdandi fyri føroyskt, ið vaks upp sum *talað* mál, heldur enn *skrivað*.

Eg eri sjálvur uppvaksin við eina vík: Skálavík. Vit siga: 'til Skálavíkar' (beint eftir regluni), men samtíðis eitur tað 'Skálvík**s**vegurin'. Menn fara út á 'Skálvík**s**havið', og tað eitur 'ein skálvík**s**drongur'.

Soleiðis kunnu vit blíva við: Ein kendur maður var Hoyvík**s**-Líggjas, ein annar Kvívík**s**-Tummas. Og so ikki at forgloyma sjálvan Lorvík**s**-Páll, sum Sjóvarbóndin yrkti um fyri meir enn 200 árum síðani. Og lurta eftir, hvussu Janus yrkir í 1943:

*"Á fúkandi ferð gjøgnum Elduvíkslíð,*
*á hestbaki fór hon, føgur og fríð,*
*við sekstan sumrum á baki."*

Tað má sigast, at sjálvsálit bilar teimum málsligu ráðgevarum ikki, sum kunnu ráða til, at vegurin gjøgnum Elduvík**s**líð skal eita Elduvík**ar**vegur.

Nei, málsliga er navnið 'Hoyvíkshøllin' púra rætt.

Ps. Her á leiðini siga vit Rituvík**s**vegurin og Æðuvík**s**vegurin.

## Almenn størv úr Tórshavn til Suðuroyar

**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri



**...fær fólk til at mála fanan á veggin**

Ein tjóðveldislandsstýrismaður dittaði sær til at siga embætisvaldinum í Tórshavn ímóti og flutti Almenna-og heilsuskúlan til Suðuroyar og gav hendan stórhending 4, skrivar fýra, almenn størv.

***Onkur "landspolitikkari" segði, at høvuðsstaðurin var við at doyggja út.***

Nú er tað ein fólkaflokslandsstýrismaður úr Suðuroy, ið endaliga hevur fingið fingurin út, og dittar sær til, at siga embætisvaldinum í Tórshavn ímóti við at flyta 20 almenn arbeiðspláss til Suðuroyar. Og hendan ætlan fær allan høvuðsstaðin upp í øsing.

***Onkur "landspolitikkari" sigur, at høvuðsstaðurin er við at doyggja út.***

Nær fóru øll hesu østu fólk í høvuðsstaðnum á barrikadurnar fyri tímaløntu arbeiðskvinnunum og manninum, tá$ ið tey vóru søgd úr stavi ella teirra arbeiðspláss var flutt.—Svarið er ongantíð!

Sum orðatakið sigur, her er roykur men eingin grind.

## Valaldurin niður

**SOFUS JOENSEN**
Kollafirði

Nú skulu teir lækka valaldurin í 16 ár. Eg mátti smílast, tá eg hoyrdi tað, tí kann ein 16 ára gamal veljast inn á ting, so kann hann, ið hvussu so er í teoriini, eisini gerast løgmaður ella ráðharri av einum hvørjum slag. Tað sum fekk meg at smílast er, at hvussu skal ein politikkari kunna takast fyri fult, tá hann ikki kann skriva ein tann einasta sáttmála undir, uttan at foreldrini eru hjá? Tú ert ikki myndigur, fyrr enn tú ert 18. 16 ára gomul kunnu ikki fara í Rúsuna at keypa sær eina øl, ella seks! Tey kunnu ikki keypa sigarettir, ella roykja. Tey kunnu ikki fáa koyrikort, ella koyra. Tey kunnu ikki fara í til dømis Elding at keypa eitt stereoanlegg upp á avbetaling, uttan at foreldrini vátta. Hetta er einki annað enn fullkomin panikkur hjá summum flokkum, at trároyna eftir teimum síðstu viðkvomu atkvøðunum. Skal lógin broytast við nøkrum trúvirði á einum øki innan fyri ein bólk, so er neyðugt at broyta alt í bólkinum!

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.